## Leivur um pápa sín, Jákup Joensen (Jákup á Ternuni)

Babba er partur av so at siga allari søguni hjá Lorvíksleiðini. Hann elskaði at vera blíður og gekk ikki altíð so høgt uppí um fólk goldu fyri ferðina. So nógv fólk hava fortalt mær um upplivingar saman við babba. Ein lorvíksingur greiddi mær einaferð frá, hvussu babba plagdi at leggja seg og spæla við smádrongirnir á Lorvíkskei. Hann var líka við øll og elskaði at møta nýggjum fólki. Kanska líkist eg honum.



## Ásla um at standa á berum

Vit fluttu niður í 1967, tí Leivur skuldi læra um nøkur produktir, sum hann skuldi selja. Stjórin var ímóti okkum á flogvøllinum og vildi vera blíður og bjóðaði okkum í Tivoli. Vit høvdu tvey stór kuffert, har alt, sum vit áttu, var í. Tá vit komu úr Tivoli, vóru bæði kuffertini stolin úr bilinum. Vit stóðu á berum, men vit vóru treisk og fingu onkursvegna pengarnar at strekkja til. Henda upplivingin gav okkum kanska styrki í kreppuárunum.




*Fyritøkan Fonn Flog er í allari stillheit voksin frá einari lítlari kjallarafyritøku til í dag at hava 13 starvsfólk við deildum í bæði Klaksvík og Runavík. Bestu reklamurnar hava verið nøgd viðskiftafólk, og fyritøkan hevur ongantíð søkt eftir starvsfólki. Mynd: Høgni Thomsen*

tað ikki. Men Leivur elskar tað. Um tað so er jólaaftan, so ger tað ongan mun. Bara hann kann hjálpa einum viðskiftafólki, so er hann glaður. Og hann sær altíð jaligt uppá tingini.

- Ásla hinvegin er sum ein spentur bogi, sigur Leivur smílandi. Hon má gera sítt arbeiði til lýtar, og tað skal vera skil í. Um vit missa eitt sindur av pengum av onkrum kundum, taki eg tað ikki so tungt. Men hon stúrir meir.

- Eg vil ikki enda aftur, har vit byrjaðu, svarar Ásla álvarsliga.

### Eitt stig í senn

- Vit komu í roynd og veru ikki upp undan fyrr enn í 1999, sigur Leivur. Nústaðni tá høvdu vit ráð at seta eitt hálvtíðarfólk afturat.

- Vit yvirlivdu við lagaligheit frá bankunum, men teir vóru so sanniliga eisini skeptiskir Eg minnist einaferð bankaráðgevin tók roknskapin, slepti pappírið niður í skrellispannina og segði, at hetta kundu vit ikki halda áfram við.

Mitt í hálvfemsunum fingu tey fyrstu teldurnar. Men Ásla leit ikki heilt á nýggju tøknina, og handskrivaðu faktureringsbøkurnar ganga heilt framm til 2001.

- Eg eri nokk eitt sindur varin, sigur hon. – Og tá vit fluttu í størri hølir í 2004 helt eg tey vera alt ov stór. Í dag eru tey longu næstan ov lítil.

Fonn Flog hevur ongantíð søkt eftir fólki. – Vit hava altíð hugsa okkum væl um, áðrenn vit hava sett nakran, og fyrsta kravið er blíðskapur. Tey mugu duga at fara við fólki og vera pligtuppfyllandi. Í so máta hava vit verið ómetaliga heldig, eg haldi vit hava bestu starvsfólk í landinum, sigur Ásla.

Spurd um hvat mál tey settu sær, tá tey byrjaðu, svara tey púra samd, at tey vildu yvirliva. Tey høvdu ongar dreymar, um at gerast so stór, sum tey eru í dag.

- Eg eri glaður fyri framgongdina, sigur Leivur, sum tó sær ein vanda í at tað gongur út yvir kundatænastun. –Og eg vil gjarna hava at tænastustøði er høgt.

Ásla heldur hinvegin, at antin er man við ella er man ikki. Men hon vil eisini gjarna hava meira tíð til ommudóttrina og alt hitt í lívinum. Sjálvt um fyritøkan gongur væl nú, er tað torført at kopla úr.

- Vit mugu rýma av landinum, um vit ynskja eina løtu fríð, sigur Leivur. – Eg blívi við at siga við Áslu, at vit skulu fara vikuskiftisferð til Danmarkar skjótt. Síðst vit høvdu fríð eitt heilt vikuskifti var í Januar mánað.

- Nei, tað gongur slett ikki, letuigur Ásla avgjørd. -Vit hava alt ov nógv at gera.

Sosialurin